Nýggir filmar hesa vikuna

Støð
Filmsheiti, **Dagur/ar** ***(klokkutíð)***

Svf
Keldan (The Spring) – amerikanskur filmur, **09.** ***(22.25)***
The Great White Hype – amerikanskur spenningsfilmur - Óhóskandi fyri smábørn, **09.** ***(23.50)***
Vetrareingil (Doomwatch: Winther Angel) - bretskur spenningsfilmur - Óhóskandi fyri smábørn, **10.** ***(22.40)***
Skrappi Luke (Cool Hand Luke) – amerikanskur filmu - Óhóskandi fyri smábørn, **13.** ***(21.00)***
3+
Heksurnar úr Eastwick, **09.** ***(21:35)***
Outside Ozona, **12.** ***(21:30)***
Sherlock Holmes: Hundurin í Baskerville, **11.** ***(19:00)***
BBC Prime
Brøðurnir Cazalet, **09.** ***(20:00)***
Canal+
40 dagar og 40 nætur, **10.** ***(19:00)*** **11.** ***(9:05)***
Dinner Rush, **09.** ***(19:00)***
Evil Dead, **15.** ***(19:00)***
Harvard Man, **12.** ***(21:55)*** **13.** ***(11:05)***
Likkulátur, **14.** ***(19:00)***
Tom og Thomas, **09.** ***(4:10)***
Vegurin til Vietnam, **13.** ***(19:00)*** **15.** ***(13:15)***
Canal+Gul
2. Veraldarbardagi - Stillið áðrenn stormin, **09.** ***(22:10)***
24 Hour Party People, **09.** ***(6:00)***
40 dagar og 40 nætur, **12.** ***(11:00)*** **14.** ***(20:00)***
Dark Blue World, **09.** ***(1:10)***
Harvard Man, **14.** ***(8:10)***
DR 1
Enemy of the State, **09.** ***(20:30)***
Harlequin: Stormandi møti, **12.** ***(21:00)***
Nutty Professor II: Klump húskið, **10.** ***(20:05)***
Pápi til fýra og Sofus gubbi, **11.** ***(15:30)***
DR 2
Casino Royale, **11.** ***(16:20)***
Happiness, **15.** ***(22:00)***
Seinasta vitnið, **15.** ***(19:30)***
Hallmark
Defending Our Kids, **15.** ***(19:30)***
Jasper, Texas, **10.** ***(21:30)***
Mystery Woman, **12.** ***(21:00)***
The Innocents Abroad, **10.** ***(6:45)***
The Private History of a Campaign that Failed, **14.** ***(8:30)***
TCM
Zigzag-morðið, **14.** ***(22:25)***
TV 2 zulu
Indiana Jones í Hollywood, **11.** ***(13:50)***
TV 3
Bukka teg titt fyl, **11.** ***(23:00)***
The Getaway, **10.** ***(20:30)***
TV-1000
American Outlaws, **10.** ***(19:00)*** **15.** ***(17:00)***
Hjúnarlag fyri opnum leiktjaldi, **12.** ***(19:00)***
The Survivors, **09.** ***(19:00)***
Vampires: Los Muertos, **15.** ***(19:00)***
TVDanmark1
Kærleikans spæl, **10.** ***(1:40)***
Men with Guns, **10.** ***(0:05)***
Open Cut, **10.** ***(14:40)***
Seinasta dupultagentarnir, **15.** ***(20:00)***
Skeivar tíðir, **14.** ***(20:00)***
TVDanmark2
Skapt til succes, **10.** ***(19:50)***

Fríggjadagin 9. kl. 19.00

Dinner Rush
CANAL+
Vælkomin til in-staðið, Gigino, í New York. Her er tað Louis, sum ræður, men tað er sonurin, Udo, sum fær staðið til at blóma. Og áðrenn kvøldið er liðugt, hava gestirnir fingið eina óvæntaða uppliving.

Fríggjadagin 9. kl. 20.00

Michael Moore-píniligi sannleikin
explorer
Tolir tú at hoyra sannleikan? Ert tú stjóri ella hevur tú ávirkan, so er kanska tíð at krógva teg. Michael hevur nevniliga titt telefon-nummar, og hann kann ringja nær tað skal vera, og so er tað, at píniligi sannleikin kemur fram.

Fríggjadagin 9. kl. 22.35

Heskirnar úr Eastwick
Tær triggjar vøkru kvinnurnar, Alex, Sukie og Jane, búgva í eini lítlari bygd í New England. Fyri at fáa tíðina at ganga, royna tær seg við ymsum kinverskum kærleiksuppskriftum, og tá ein ungur flottur og single maður brádliga kemur til býin, tykist hetta hava givið úrslit.

Fríggjadagin 9. kl. 23.50

The Great White Hype
SVF
Tá inntøkurnar hjá boksipromotaranum, Fred Sultan, eru um at minka, gerst hann sannførdur um, at okkurt má gerast. Hann velur at skipa fyri einum svørtum-móti-hvítum dysti, men spurningurin er, hvørt tað er møguligt at finna nakran hóskandi mótstøðumann til James Roper, sum Sultan eisini tekur sær av.

Leygardagin 10. kl. 17.50

Bridezillas
Ein bridezilla er ein komandi brúður, sum brádliga gerst at kalla besett, tá hennara egna brúdleyp skal leggjast til rættis. Einki skal kiksa, og tað ræður um at hava tamarhald á øllum. Tað snýr seg ikki bert um at siga ja, men eisini um at siga, hvat vil eg hava á stóra degnum.

Leygardagin 10. kl. 19.00

40 Days and 40 Nights
CANAL+
Matt hevur gjørt tað líðugt við gentuna hjá sær, og samstundis hevur hann lovað sær sjálvum, at hann í 40 samdøgur skal halda seg púrasta burtur frá sex og kropsligari samveru annars. Alt gongur eftir ætlan, men so kemur Erica brádliga inn í lív hansara.

Leygardagin 10. kl. 21.40

Getaway
Doc McCoy er endaður í fongsli, tí vinir hansara runnu undan honum undir einum ráni, soleiðis at teir sluppu undan sínari revsing. Doc kennir tó ríkmannin, Jack Benyon, og saman við honum ætlar hann sær at gera eitt risastórt rán. Hetta tó treytað av, at Benyon kann fáa seg úr fongslunum.

Leygardagin 10. kl. 22.40

Vetrareingil
SVF
Ein vanlukka við geislavirknum burturkasti á einum avtoftaðum kjarnorkuverki verður uppdagað av umhvørvisverndarfólki, sum búgva í nánd. Og skjótt stendur greitt, at okkurt er heilt galið. Eitt fyri og annað eftir hvørva umhvørvisfólkini í einum veldugum menniskjaskaptum svørtum holi.

Sunnudagin 11. kl. 19.00

Krøniken
DR1
Ida er, sum einasta gentan í flokkinum, í ferð við sitt studentaskeið, og samstundis stríðist hon fyri at taka sær av vanligu skúlagongdini og einum arbeiði við síðuna av.

Sunnudagin 11. kl. 19.00



Sherlock Holmes: Hundurin í Baskerville
Matt Frever hevur fyri fyrstu ferð leiklutin sum Sherlock Holmes. Í meira enn 350 ár hevur hundurin í Baskerville dripið arvingarnar í Baskerville-ognini. Kann Holmes finna útav, hvat tað veruliga er, sum gongur fyri seg.

Sunnudagin 11. kl. 20.00

Brúdleypið hjá besta vini mínum
Fjølmiðlafólkini Julianne og Michael, hava verið vinfólk í langa tíð, men tað eru tey ikki longur. Michael hevur nevniliga fríggjað til tí ungu og ríku Kimberly, og tá Julianne fær hetta at vita, finnur hon samstundis útav, at hon í veruleikanum elskar Michael.

Sunnudagin 11. kl. 20.50

Tinggáttin
SVF
Á Tinggáttini hitta vit formenninar í flokkunum, sum stilla upp til løgtingsvalið, har hesir fara at skifta orð við tveir journalistar. Í kvøld er tað hin stuttligi flokkurin við Johan í Kollafirði, sum vitjar.

Mánadagin 12. kl. 19.00



Lost in Space
Í 2058 er Fobinson-húskið á veg til gongustjørnuna, Alpha Prime. Ætlanin er at kolonisera planetina, men orsakað av einum mistaki eru rumdarferjan nú komin til eitt heilt annað stað, har hópur av løgnum verum gera um seg. Og tær eru ikki allar so vinarligar.

Mánadagin 12. kl. 19.00

Lívið á barnadeildini
Dramatikkur, sorg og sól-skinssøgur eru gerandis-dagurin á barnadeildini á Hvidovre Hospital. Ein gerandisdagur, har bæði foreldur og starvsfólk gera sítt ítarsta fyri at bjarga smáum børnum, sum av ymsum ávum eru komin í óføri.

Mánadagin 12. kl. 22.00

Jagstranin eftir afghansku gentunum
DR2
Ensk dokumentarsending, sum snýr seg um ungu kvinnurnar í Afghanistan og møguleikar teirra. Sendingin fylgir gerandisdagnum hjá gentunum, og her fæst at síggja, hvat tær mugu finna seg í.

Mánadagin 12. kl. 22.10

The Agency
SVF
Meira enn nøkur onnur røð, so líkist spælið hjá teimum í the Agency arbeiðinum hjá CIA. Hvussu gongur tað fyri seg, tá fíggindarnir skulu finnast, tó at teir ikki eru so sjónligir, sum teir vóru tað undir kalda krígnum?

Týsdagin 13. kl. 19.00

Hjartarúm
DR1
Karina og Henrik flyta saman. Hann er fegin um gomlu møblarnar hjá sær, men Karina vil heldur hava sínar nýggju og smartu møblar. Semjan verður tó, at Henrik fríðar stereoanleggi, og Karina fær sínar Arne Jacobsen møblar við, men hvussu er við 8-ára gomlu dóttrini hjá Henrik?

Týsdagin 13. kl. 20.00

Sex Games
Kathryn veddar við stjúkbeiggja, Sebastian, hvørt hann megnar at forføra dótrina hjá nýggja rektaranum. Eydnast hetta ikki, vinnur Kathryn bilin hjá Sebastian. Eydnast tað, so vinnur hann – Kathryn!

Týsdagin 13. kl. 20.45

Michael Jackson slær aftur
Eru allar skuldsetingarnar móti Michael Jackson sannar. Hetta er avdúkandi dokumentarsending um Michael Jackson, og gevur hann í hesum svar upp á nakað av tí, sum Martin Bashir førdi fram í sínari sending, Living with Michael Jackson.

Týsdagin 13. kl. 21.00



Skrappi Luke
SVF
Skrappi Luke verður dømdur tvey ár í fongsli fyri misbrot, sum hann hevur gjørt í fyllskapi. Í fongslinum brestir hann skjótt saman við Dragline, men hóast hesin er leiðarin hja fangunum, so stendur skjótt greitt, at allir í fongslinum eisini síggja nógv upp til Luke.

Mikudagin 14. kl. 18.00

Hjálp, vit skulu gera mat
explorer
Kjøtrættir. Kennir tú kensluna av at hava ov nógv kjørt í frystiboksini og ikki vita, hvat tú skalt gera við tað. Hesaferð ger James millum annað risafrikadellur, eksotiskar rættir úr svínakjøti og ikki minst, so eru tað spare-ribs, sum eru á skránni.

Mikudagin 14. kl. 20.00

Prinsessan og marinusoldaturin
Sanna søgan um prinsessuna, Meriam Al-Khalifa úr Bahrain og amerikanska marinaran, Jason Johnsson. Hóast hon enn ikki er lovað nøkrum øðrum, so vilja foreldrini hja'Meriam ikki hoyra talan um, at hon skal giftast einum amerikonskum hermanni, men viljin hjá dóttrini er sterkur.

Mikduagin kl. 20.25

Plastic Fantastic
Tú verður ikki vakrari av at arbeiða á skurðdeildini á plastic-fantastic, og tað er heldur eingin treyt. Men hinvegin hava starvsfólkini góðar møguleikar fyri avsláttri upp á skurðviðgerðir, og hvønn dag síggja tey, hvussu góðan mun hesar kunnu gera.

Mikudagin 14. kl. 22.00



Danskir DJ's
DR2
Hesaferð fylgja vit m.a. Noize, sum í 1993 vann HM-kappingina í New York. Eisini verður fylgt við Thomas Madvig og at enda verður farið til Japan, har Tobi skal finna sær nýggja inspiratión í sínum yrki.

Hósdagin 15. kl. 13.00

Family Law
Lynn tekur sjálv stig til at liva sunnari, tá hon gerst greið um, hvussu ósunnur hennara livihættur í veruleikanum er. Rex og Randi eru saman um eitt mál um tveir beiggjar, har annar er drápsmaður. Tey vita bara ikki, hvønn beiggja talan er um.

Hósdagin 15. kl. 19.30

Vagn í Indiu
DR1
Vagn er nú komin til Kerala - landið hjá piparið grør - í Suðurindiu. Her fær hann eina rundvising í eini kryddariplantagu, har ikki bara pipar, men eisini kanel, muskat, nellikur og kardamumma verður dyrkað.

Hósdagin 15. kl. 20.00

Snake Eyes
Ein stórdystur í nevaleiki verður boksaður í einum casino í Atlantic City. Mitt undir dystinum verður ein av áskoðarunum myrdur, hóast hann hevði lívverju við á staðnum. Einasta, sum tykist vera greitt, er at ein reyðhærd kvinna eina løtu villeiddi lívverjan, men annars eru ongar slóðir at fara eftir.

Hósdagin 15. kl. 21.55

Krimitímin: Beck
SVF
Malin Tavast verður álopin, tá hon súkklar í skóginum, og tá fartelefon og súkkla seinni verða funnin, er gentan horvin. Samstundis kannar Beck morðið á Evu Lindskog, sum er neyðtikin og kvald. Ávís tekin eru um, at hesi bæði morðini hava nakað við hvørt annað at gera, og samstundis skal Beck hugsa um sjúka abbabarni á sjúkrahúsinum.

Ítróttur

TV3
Leygardagin 10. kl. 14.00
Tipslørdag

CANAL+
Leygardagin 10. kl. 14.45
Premier League Leygardagur: Arsenal-Middlesbrough
Sunnudagin 11. kl. 13.55
Premier League
Sunnudagin 11. kl. 16.00
Premier League: Manchester Utd.-Newcastle
Sunnudagin 11. kl. 22.00
NHL: N.Y. Rangers-Tampa Bay

CANAL+
Leygardagin 10. kl. 19.25
Seria A
Sunnudagin 11. kl. 19.25
Seria A

DR1
Sunnudagin 11. kl. 18.05
Hondbóltur: Krim Ljubljana-Ikast/Bordgin, kvinnur
Mikudagin 14. kl. 20.50
Hondbóltur: Viborg-Aalborg DH, kvinnur
Hósdagin 15. kl. 21.00
Hondbóltur: Danmark-Ísland, menn

EUROSPORT
WC Skíðskjóting úr Pokljuka, Slovenia
WC Skíðskjóting úr Ruhpolding, Týskland
WC Langrenn úr Otepää, Estlandi
WC Skíðlop úr Liberec, Kekkia
WC Strok úr Chamonix, Fraklandi
EM Skoyting úr Heerenveen, Hollandi
Supercross úr Dortmund, Týsklandi
Fótbóltur, venjiingardystir
Rally Dakar
Flogbóltur OL-undankapping
ATP Tennis úr Doha, Quatar
ATP Tennis úr Sydney, Australia

TV2 ZULU
Rally Dakar
NFL
Innandura Fótbóltur, BT-Cup

TV3
Leygardagin 10. kl. 18.00
Hondbóltur: Danmark-Serbia
Sunnudagin 11. kl. 10.30
Hondbóltur úr Moskva, Russlandi

TV1
Leygardagin 10. kl. 18.25
La Primera
Leygardagin 10. kl. 20.25
La Primera
Sunnudagin 11. kl. 19.55
La Primera
Sunnudagin 11. kl. 21.55
NBA: Toronto-Portland

Hondbóltur úr Moskva, Russlandi
Kurvabóltur Euroleague

VARPIÐ
Eykablað í Sosialinum
hvønn fríggjadag

Postsmoga 76
110 Tórshavn
Telefon: 341800
Fax: 341801
e-mail: varp@sosialurin.fo

Útgáva: Sosialurin
Umbróting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin